## Seldu nógvan fisk

Norðmenn seldu í januar fiskavørur av landinum fyri 3,1 mia. krónur, og so væl hevur ársins fyrsti mánaður ongantíð roynst fyrr. Samanborið við januar í 2007 er vøksturin góðar 200 mió. krónur. Ein stór orsøk til tað stóra virðið var sildin. Í síðsta mánaði útfluttu norðmenn sild og sildavørur fyri 492 mió. krónur, og tað var heili 44 prosent meiri enn í januar í fjør. Harafturímóti minkaði makrelsølan, meðan laksasølan var tann sama.



*Nógvar matvørur eru dýrkaðar nógv í Danmark*

## Matur vorðin dýrur

Í Danmark er matvørustýrið farið undir at kanna ymisk viðurskifti í matvøruídnaðinum. Orsøkin er, at fleiri hava illgruna um, at virkini hava avtalað prísirnar sínamillum, og tað er ólógligt. Børsen skrivar, at stýrið vitjaði fleiri bakarí í síðstu viku fyri at fáa prógv fyri illgrunanum. Matvørustýrið sigur, at prísirnir á hveitimjøli, smøri og mjólk eru hækkaðir so nógv, at tað kostar einum hjúnum við tveimum børnum 4.000 krónur meiri um árið.




*Á skipssíðuni á gamla Lómi stendur nú Norlines – og á hekkuni nýggja navnið, Nordvik – og heimstaðurin Nørresundby*

# Gamli Lómur í nýggjum hami og umhvørvi

**Ein av okkara lesarum, sum um dagarnar hevur verið í arbeiðsørindum í Pólandi, hevur sent okkum myndir av Lómi, sum Faroe Ship hevur selt til Danmarkar. Myndirnar eru tiknar í pólska býnum Gdynia**

FARMASIGLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Við fáum reglum sigur lesarin, at hesar myndir eru tiknar í nýggja umhvørvinum hjá skipinum, sum eisini er í nýggjum hami. Lómur siglir nú millum eitt nú Danmark, Noreg og Póland.

Á skipssíðuni stendur Norlines, sum er reiðaríið, og á hekkuni stendur nýggja navnið, Nordvik og nýggi heimstaðurin, sum er Nørresundby í Danmark.

### Blikur fer eisini

Bæði Lómur og Blikur eru seldir danska reiðarínum Janus Andersen, sum eigur og rekur fleiri skip, men Blikur er ikki farin úr Føroyum enn.

Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, sigur, at Blikur fer seinasta túrin úr Føroyum í komandi viku, tá ið hann eisini verður latin nýggja eigaranum.

– Tíðin var komin til at skifta systurskipini út, nú tey tátta í teimum 30 árunum. Nýggju skipini, sum bera somu nøvn, eru nógv størri og betri. Hetta eru bingjuskip, sum taka umleið 700 20 fót bingjur hvørt, sigur stjórin.

Blikur og Lómur, sum nú sigla fyri Faroe Ship, eru langtíðarleigað.

– Vit eru sera væl nøgd við hesi skip.



*- Nakrir av manninginI, sum vóru og framvegis eru við gomlu skipunum Lómi og Bliki halda fram hjá nýggju eigarunum, sigur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Nýggj høvuðshavn

Hon sigur, at felagið hevur niðurlagt Hirtshals sum høvuðshavn í Danmark, og nú er Århuus nýggja høvuðshavnin á farleiðini hjá hesum skipum.

Saman við nýggja Bliki og Lómi, sigla eisini Dettifoss og Godafoss í rutu fyri Faroe Ship.

– Aftrat hesum hava vit eisini tey bæði smærru skipini, Sirius, sum serliga siglir við fóðuri og Nordland, sum siglir í Noregi.

Jóhanna á Bergi sigur, at Faroe Ship við útskiftingini av Lómi og Bliki hevur lagt flotan um til bingjuloysnir, sum hon tekur til og heldur vera rætti vegurin hjá felagnum at ganga.

### Halda fram

Vit spurdu eisini stjóran í Faroe Ship, hvat verður av manningunum, sum sigldu og sigla við Lómi og Bliki.

– Nakrir hava tikið av tilboðnum hjá danska reiðarínum at halda fram umborð á skipunum, og her er serliga talan um maskinmenn. Summir hava fingið arbeiði aðrastaðni í felagnum hjá okkum, og uppaftur aðrir hava funnið sær aðrar kjansir, sigur Jóhanna á Bergi.

# Fyrstu pláturnar skornar til gøtutrolaran



*Pólska skipasmiðjan hevur smíðað nógv stór skip, og her stendur eitt teirra í einari av stóru byggihallunum í Gdynia*

**Í hesi vikuni byrjaði pólska skipasmiðjan, sum smíðar skrokkin til nýggja pelagiska skipið hjá P/F Vinnuni, at skera fyrstu stálpláturnar til skipsskrokkin**

SKIPABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur eisini frætt úr Pólandi í vikuni, at fyrstu pláturnar, sum seinni skulu gerast partur av nýggja pelagiska skipinum hjá gøtumonnum, nú verða skornar á pólsku skipasmiðjuni, Stocznia Marynarki Wojenej.

– Eg havi í morgun verið á hesi skipasmiðju í øðrum ørindum og veit fyri vist, at skipasmiðjan í dag legði fyrstu stálpláturnar til hendan skrokkin undir teldustýrdu skerimaskinurnar. Hesi allar fyrstu smáu pettini, sum seinni gerast partur av nýggja skrokkinum, fingu sítt skap á skipasmiðjuni í morgun.

Soleiðis ljóðaði meylurin, sum Sosialurin fekk úr Pólandi í morgun.

Maðurin, sum vit hava samband við, er ikki partur av hesi verkætlan, men var sum nevnt á pólsku skipasmiðjuni í øðrum ørindum.

Skrokkurin til nýggja skipið hjá P/F Vinnuni í Gøtu verður soleiðis smíðaður í Pólandi, og síðan verður skipið smíðað liðugt á Kartensens Skibsværft í Skagen.

### 230 milj. krónur

Í grein um nýggja skipið í mai mánaða í fjør, skrivaðu vit í Sosialinum, at nýggja skipið fer at kosta einar 230 miljónir krónur og skal fiska fyri einar 70 miljónir krónur um árið fyri at svara hvørjum sítt.

Nýggja skipið verður ætlandi 81 metrar langt og 17 metrar breitt. Tað kemur at lasta umleið 2.700 tons av fiski og fer at rúma umleið 900 rúmmetrum av olju.

Ætlandi verður flaggskipið hjá P/F Vinnuni í Gøtu liðugt einaferð í komandi ári.